# Framferðin hjá formanninum í Fiskimannafelagnum er ódámlig

**Nýggi formaðurin í Fiskimannafelagnum hevur lagt seg á eina ódámliga kós, heldur formaðurin í Reiðarafelagnum**

ARBEIÐSMARKNAÐUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Í mínum hugaheimi er kósin eitt sindur ódámlig.

Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum, heldur lítið um framferðina hjá nýggja formanninum í Fiskimannafelagnum.

Í Sosialinum í gjár greiddu vit frá, at Fiskimannafelagið hevur givið nøkrum reiðarum ávaring fyri at hava brotið sáttmálan við fiskimannafelagið og hevur hótt við at almannakunngera ein svartalista við nøvnunum á reiðarunum, sum fremja fleiri brot á sáttmálan.

Hetta fyri at ávara sjófólk ímóti at fara við skipunum hjá hesum reiðarum.

Tað skerst ikki burtur, at nýggi formaðurin í Fiskimannafelagnum hevur lagt eina nýggja linju fyri fakfelagsarbeiðnum, har tónalagið er harðari, enn tað plagdi vera mótvegis reiðarunum.

Eftir mínum tykki er nýggja kósin eitt sindur ódámlig, sigur Jákup Sólstein.

Hann vísir á, at tað er ikki gamalt í Føroyum at hótta við at seta fólk á svartalista.

Hann kennir heldur onki til, at tað skal vera vanligt hjá summum reiðarum at skúgvað sáttmálan til viks.

### Í øllum stillum

Hann sigur, at hugburðurin hjá reiðarafelagnum er tann, at tað er ein sáttmáli við Fiskimannafelagið og hann skal haldast

- Men sjálvandi kann ósemja taka seg upp um, hvussu ávísir partar í sáttmálanum skulu tulkast. Tað kann eisini koma fyri, at sáttmálin verður brotin í gáloysni ella av ósketni.

- Eg haldi, at tað er serstakliga sjáldan, at sáttmálin verður brotin við vilja.

Møguliga hevur onkur einstakt mál verið við einstakum felag, men tað hevur ikki verið nakað, sum feløgini hava kent seg noydd at tikið upp sínamillum.

Hann kennir onki til, at tað er vanligt, at sáttmálar verða brotnir, men hendir tað, plaga tað at verða avgreitt í øllum góðum, uttan at tað hevur verið neyðugt at hótta við bæði báli og brandi

- Men í slíkum førum plagdu vit sum allaroftast at loysa trupulleikan við eini telefonsamrøðu í øllum stillum.

At tað skal vera ein almennur trupulleiki, kennir Jákup Sólstein einki til.

- trupulleikarnir hava ikki verið nógvir í so máta, so hetta seinasta útspælið frá Fiskimannafelagnum man vera at sambera við storm í einum vatnglasi.

Annars dugir hann ikki at siga um viðurskiftini ímillum Fiskimannafelagið og Reiðarafelagið eru versnað eftir formansskiftið í Fiskimannafelagnum.

- Jan Højgaard er so mikið nýggjur í Fiskimannafelagnum, at enn hava vit ikki havt so mikið av samskiftið við hann, at tað ber til at siga, um viðurskiftini ímillum feløgini bæði eru versnað ella ikki, sigur Jákup Sólstein.



*- Tað er ikki gamalt í Føroyum at hótta við at seta fólk á svartalista, sum Fiskimannafelagið nú ger, sigur Jákup Sólstein, formaðurin í Reiðarafelagnum*

# Vandin er størstur í Havn

**- Tað er í høvuðsstaðnum at vandin fyri einum ótálmaðum búskapi er størstur, sigur forkvinnan í Kommunufelagnum og tí er fyrst og fremst neyðugt at fáa Tórshavnar býráð at halda aftur**

BÚSKAPARSTÝRING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit eru altíð til reiðar at tosa við Magna Laksáfoss um at tálma búskapin hjá kommunum. Men at endanum stendur tað til hvørja einstaka kommunu, um hvønn fíggjarpolitikk, tær reka.

Rósa Samuelsen er forkvinna í Føroya Kommunufelagi, sum er felagið hjá teimum smærru kommununum í landinum.

Og frammanundan vil hon ikki afturvísa ætlanini hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum um at fáa kommunurnar at halda aftur við útreiðslunum næsta ár fyri at tálma búskapinum.

Hinvegin vísir hon á, at kommunurnar kunnu ikki skylda meiri enn eina álíkning í skatti og tí er tað avmarkað, hvussu stóra skuld, tær kunnu seta seg í.

- Støðan er nú tann, at nógvar miðalstórar kommunur hava gjørt íløgur og eru við koma upp undir loftið uppá eina álíkning í skuld og sostatt er tað avmarkað, hvat tær kunnu gera afturat. Hinvegin eru tað aðrar, minni kommunur, sum kanska eiga pening, men tær eru so mikið smáar at við atliti at landsbúskapinum ger tað lutfalsliga lítlan mun at tálma búskapin hjá hesum kommunum.

Rósa Samuelsen vísir á, at hinvegin er høvuðstaðar kommunan sera væl fyri.

- Tórshavnar Kommuna hevur onga skuld, samstundis sum hon hevur eina inntøku upp á meiri enn 600 milliónir krónur um árið. Sostatt stendur hon fyri umleið helvtini av øllum tí kommunala búskapinum.

- Sostatt er tað er fyrst og fremst í Tórshavnar Kommunu, at vandin er størstur fyri einum ótálmaðum búskapi, sigur forkvinnan í Føroya Kommunufelagi.

### Skilagott og neyðugt

Orsøkin til, at Magni Laksáfoss vil hava kommunurnar at tálma búskapinum næsta ár, er, at hann vil sleppa at føra ein konjunkturstýrandi fíggjarpolitikk.

Í løtuni er nakað nógv ferð á búskapinum og tí vil landsstýrismaðurin køla eitt sindur.

Í hesum sambandi hevur hann víst á, at tað er neyðugt at taka allan búskapin undir einum og tí er eisini neyðugt at taka kommunubúskapin við, tí hann er so stórur partur av samlaða búskapinum.

Í hesum sambandi hevur landsstýrismaðurin lagt upp til, at kommunurnar og landið semjast um ein felags útreiðslukarm, har hvørki landið ella kommunurnar skulu økja um útreiðslurnar næsta ár.

Samstundis hevur hann eisini skotið upp at skerja mvg endurgjaldið til kommunurnar, so at kommunurnar skulu fáa 72 milliónir minni í mvg endurgjaldið úr landskassanum.

Ætlanin er so, at hesin peningur skal fara í ein kommunalan útjavningargrunn.

- Føroya Kommunufelag heldur, at tað er bæði skilagott og neyðugt, at landið og kommunurnar eru felags um at stýra búskapinum, sigur Rósa Samuelsen.

- Nógvar kommunur føla avleiðingarnar av at búskapurin er ov heitur við tað, at tað er torført at fáa neyðug arbeiði gjørd, og nógv arbeiði gerast óneyðuga dýr.

- Hinvegin er nógv av hesum arbeiðum neyðug, eitt nú skúlar, ansingarstovnar vatnveiting og kloakering.

Hon leggur afturat, at serliga torført sær tað út til at vera at arbeiði gjørd uttanfyri miðstaðarøkið.

- Føroya Kommunufelag tekur eisini undir við at vit fáa eina inntøkuútjavning ímillum kommunurnar.

Rósa Samuelsen heldur eisini, at tað ljóðar áhugavert, at ein slík útjavningarskipan skal fíggjast við at minka mvg endurgjaldið til kommunurnar.

- Føroya Kommunufelagið vil avgjørt vera við til at viðgera eina slíka skipan, sigur hon.

Í næstum fer stýrið fyri Føroya Kommunufelag at viðgera uppskotið frá landsstýrismanninum.

*- Tað er bæði skilagott og neyðugt, at landið og kommunurnar eru felags um at stýra búskapinum. Men tað er í Havnini, at vandin er størstur, sigur Rósa Samuelsen.*

